# felags mynd av støðuni



Sunleif Højgaard tosar við løgreglumenn, áðrenn farið verður inn á MRCC-støðina á eftirmetingarfund. - Vit hava sera gott samstarv við løgregluna, sigur umsjónarmaðurin hjá Skálafjarðar Sløkkiliði
Mynd: Vilmund Jacobsen




Eftirmetingarfundur var á MRCC-støðini í gjár, og í hesi greinini verður víst á tær felags niðurstøður, sum fundurin gjørdi
Mynd: Vilmund Jacobsen



, hvat kundi verið gjørt øðrvísi. Eg haldi, at Olshanu-málið kann læra okkum nógv um tilbúgving og
Mynd: Jens Kr. Vang

# Ósemja um at hála skipið av

**Á eftirmetingarfundinum, sum var á MRCC-støðini í gjár, var eingin felags niðurstøða gjørd um, hvørt tað var rætt ella skeivt at taka russiska trolaran Olshanu av Flesjunum. Hinvegin kom fundurin til felags niðurstøður um onnur viðurskfti í sambandi við bjargingararbeiði**

OLSHANA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Klokkan 13 í gjár sessaðust eini 45 fólk á MRCC-støðini við Tinghúsvegin at eftirmeta arbeiði, sum gjørt varð, tá Olshana fór á Flesjarnar seinasta hóskvøld – og sakk 12 tímar seinni.

Tey, sum vóru við í eftirmetingini, vóru fólk frá ymiskum eindum, sum á ymiskan hátt vóru við í bjargingararbeiðnum.

Anni á Hædd, tilbúgvingarstjóri, hevur sent fjølmiðlunum eina kunning, har hon vísir á tær felags niðurstøður, sum vórðu gjørdar á fundinum.

Í stuttum er felags niðurstøðan, at tilkalling av eindum til átaksstaðið riggaði væl eftir mayday. Samskiftið millum eindirnar gekk væl við tað, at megin-parturin av samskiftinum gekk um whf, kanal 16.

- Innsatsleiðarin fekk tó ikki nóg nógvar upplýsingar um støðuna, og yvirlitið yvir sonevnda POB á Olshanu átti at verið meira fullfíggjað, tá bjargingarfólk fóru umborð.

### Eisini manning

Í skrivinum verður sagt, at MRCC undir slíkum umstøðum ikki bara skal umbiða materiel, men eisini manning til at brúka amboðini, eitt nú pumpur.

- Á fundinum varð røtt um arbeiðsbyrðuna hjá OSC (on scene commander) – um at hendan kann gerast ov stór. Tí kundi verið umhugsað at skift OSC undir bjargingararbeiðnum, men hetta krevur gjølliga umhugsan.

Ein onnur av niðurstøðunum er, at ov lítið varð gjørt fyri at minka um skaðarnar á skipið – at tetta skipið.

Felags niðurstøðan kom tó ikki til nakra felags niðurstøðu, um tað varð rætt ella skeivt at taka skipið av Flesjunum.

- Ymiskar meiningar vóru um hetta, sigur tilbúgvingarstjórin.

### Fyribyrging

Á eftirmetingarfundinum varð eisini tosað um ymisk viðurskifti, sum kundu verið við til at fyribyrgt slíkar hendingar.

- Vit eiga at umhugsa krav um loðs og hava betri avmarkingar á Flesjunum.

At enda í felags niðurstøðuni er spurningurin um trygging.

- Spurningurin er, um krøv skulu setast til trygging og garanti, tá skip undir útlenskum flaggi koma inn á føroyskt sjóøki, sigur tilbúgvingarstjórin, Anni á Hædd, í skrivinum eftir eftirmetingarfundin.